# Bill Justinussen brúktur til útbreiðslu av porno



**Heimasíðan hjá Bill Justinussen hevur seinasta árið virkað, sum inngongd til pornografiskar síðir. Bill visti av ongum, men hevur nú tikið stig til, at strika síðuna.**

ALNET

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Síðan juli mánað í fjør hevur heimasíðan hjá Bill Justinussen, løgtingsmanni Miðfloksins verið inngongd til útlendskar heimasíður, ið liggja sera fjart frá tí politisku linju, ið hesin flokkur leggur seg eftir. Bróðurparturin er heimasíður av pornografiskum slag, við heitum sum Old Grannys Pissing Movies, Dad and little boy sex, Lesbian Porn, Male genital spanking og annað tílíkt, umframt link til Viagra sølu og gambling. Talan er um útvið 14.000 leinkir, av ivasomum uppruna.

Bill Justinussen sjálvur sigur við Sosialin, at hann einki visti um skilið fyrr enn í gjár, og at hann beinanvegin setti seg í samband við veitaran av heimasíðuni Teletech, og bað um at síðan varð latin aftur. Beint áðrenn evstamark okkara varð heimasíðan strikað av netbústaðnum bill.teletech.fo

– Teletech sigur, at virkið einans leggur servara pláss til síðuna, men annars onga avtalu hevur við Bill, um at reka síðuna, tí hava tey heldur ikki hildið eyga við, hvat hendur á síðuni.

– Eg fekk hasa heimasíðuna í sambandi við seinasta val, og hon hevur ikki verið virkin síðan tá. Eg havi ikki verið inni á heimasíðuni síðan tá, greiður Miðflokka tingmaðurin frá.

Bill sjálvur dugur als ikki at umsita heimasíðir, og hevði tí ein vevstjóra í sambandi við síðsta val, sum tók sær av síðuni. Bill sjálvur lat bert tilfarið til síðuna, so legði vevstjórin tað út fyri hann.

– Eg dugi ikki at gera heimasíðir, og havi ikki orku at seta meg inn í tað, eg veit enntá ikki sjálvur hvussu man tekur heimasíðuna burtur, sigur Bill.

Men er tað ikki óheppi, hjá einum tingmanni hjá Miðflokkinum, at hava pornografiskt tilfar á heimasíðu síni í eitt hálvt ár?

– Jú, tað er ómetaliga keðiligt, men heimasíðan er sum sagt ikki aktvi, so eg rokni ikki við, at nakar vitjar hana. Men tað er greitt, at man følir seg ikki væl, tá tílíkt hendur. Eg veit ikki hvør stendur aftan fyri tí, men tað er keðiligt, at fólk misbrúka heimasíðuna hjá einum, sum tekur frástøðu frá tílíkum, sigur Bill Justinussen. Hann heldur fram:

– Tað er bara forsømilsi, at eg ikki havi biðið Teletech um, at tikið síðuna burtur, men nú havi eg lært, at tað ikki er gott, bara at leggja heimasíðu sína deyða millum tvey val, tí onkur kann misbrúka hetta.

Bill Justinussen sigur seg ivast í, at hann fer at hava heimasíðu til komandi løgtingsval.




*Ein av teimum fúlu leinkjunum á heimasíðuni bill.teletech.fo*

# Bill Justinussen kann ikki lastast

**Hóast tað kann tykjast merkisvert, at Bill Justinussen ikki vitjar heimasíðu sína í nógvar mánaðir, so kann Bill ikki lastast fyri innihaldið á síðuni, sigur løgreglumaður, ið dagliga fæst við KT-kriminalitet.**

ALNET

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hans Henrik Jensen, varapolitikommiserur á donsku KT-kriminalløgregluni starvast til dagligt við KT-Kriminaliteti. Hann sigur við Sosialin, at hann sjálvandi ikki kann úttala seg í konkreta málinum, men at tann, ið eigur eina heimasíðu vanliga hevur ábyrgdina av heimasíðuni. Tað er sostatt Bill Justinussen, ið hevur ábyrgd av heimasíðuni bill.teletech.fo. Men tá tað snýr seg um tilfar, ið onnur hava lagt út, uttan at eigarin veit av tí, so kann eigarin ikki lastast fyri hetta.

– Hetta kann samanberast við, at onkur blakar okkurt inn gjøgnum brævsprekkuna hjá tær, og tú ber hetta inn saman við tilboðsbløðunum, um tú ikki veitst av tí, so kanst tú heldur ikki lastast fyri tað. Men í tí løtu, tú gerst varur við málið, er støðan ein onnur, og tú eigur, at taka stig til at fáa tað strikað, sigur Hans Henrik Jensen.

Hann viðgongur, at tað er heldur sjáldsamt, at fólk ikki vitja sína heimasíðu í tíðarskeið, ið eru yvir eitt hálvt ár, men heldur ikki, at hetta er nakað, ið nøkur søk kundi komið burtur úr.

Bill Justinussen gjørdist ikki varur við, at heimasíðan hansara var inngongd til út við 14.000 heimasíður við pornografiskum tilfari fyrr enn í gjár. Hann tók beinanvegin stig til at fáa síðuna strikaða, sostatt kann Bill ikki lastast í hesum óhepna máli, um tað skuldi víst seg, at onkur av heimasíðunum hevur tilfar, ið er av ólógligum karakteri.



Bill Justinussen - Kjak - Windows Internet Explorer

http://bill.teletech.fo/forum/list.php?f=10

File Edit View Favorites Tools Help

Søg på internettet Spaces

Norton AntiVirus Norton Internet Security

Bill Justinussen - Kjak Page Tools

## Kjak

Nýtt evni | Upp til toppin | Leita Eldri boð

| Evni | Rithøvundur | Svar | Nýggjastu boð |
|---|---|---|---|
| tight black anal sex Nýtt | totally free porn no cards no charge | 0 | 02-21-07 06:45 |
| home amateur bestiality free sex picks Nýtt | caught girls pissing outdoor | 0 | 02-21-07 06:45 |
| nickolodian tv stars naked Nýtt | butt naked female movie stars | 0 | 02-21-07 06:17 |
| free big black cocks dicks Nýtt | family naked in park | 0 | 02-21-07 06:17 |
| old grannies pissing movies Nýtt | soaring eagle casino michigan employm | 0 | 02-21-07 06:17 |
| naked famous hip hop stars Nýtt | big dicks tight pussy free movies | 0 | 02-21-07 06:17 |
| free cum scenes big dicks Nýtt | free nude models escorts bbw | 0 | 02-21-07 06:16 |
| online pharmacies tramadol soma Nýtt | pregnancy tramadol | 0 | 02-21-07 06:10 |
| safety of tramadol in cats Nýtt | killer pain tramadol | 0 | 02-21-07 06:10 |
| purchase tramadol without prescription Nýtt | cheap discount online tramadol | 0 | 02-21-07 06:09 |
| iowa churches old testament Nýtt | pennine gay sauna oldham | 0 | 02-21-07 06:08 |
| free roulette game downloads Nýtt | rosa roulette | 0 | 02-21-07 06:08 |
| last book of the old testament Nýtt | gay hard spanking video | 0 | 02-21-07 06:08 |
| mp3 roulette Nýtt | zard unmei no roulette o mawashite | 0 | 02-21-07 06:08 |
| sex roulette turn on Nýtt | single zero roulette casino | 0 | 02-21-07 06:08 |
| rosa roulette Nýtt | free roulette game downloads | 0 | 02-21-07 06:08 |
| hentai Nýtt | hentai | 0 | 02-21-07 05:58 |
| gay Nýtt | gay | 0 | 02-21-07 03:18 |
| boobs Nýtt | boobs | 0 | 02-21-07 03:04 |
| test Nýtt | tom | 0 | 02-21-07 00:36 |
| asian Nýtt | asian | 0 | 02-20-07 23:59 |
| lesbian Nýtt | lesbian | 0 | 02-20-07 22:02 |
| pussy Nýtt | pussy | 0 | 02-20-07 19:38 |
| tit Nýtt | tit | 0 | 02-20-07 19:07 |
| totally free star wars porn Nýtt | porn totally free hot | 0 | 02-20-07 18:46 |
| sexy naked athletes Nýtt | pissing in pantyhose | 0 | 02-20-07 18:46 |
| watch girls pissing Nýtt | free full length sex vids | 0 | 02-20-07 18:45 |
| naked japanese porn stars Nýtt | my free sex vids | 0 | 02-20-07 18:45 |
| free nude models pictures Nýtt | free nude pictures of dark blonde mod | 0 | 02-20-07 18:19 |

Internet 100%

*Aftur í morgun vóru fleiri pornografiskar heimasíðuleinkir lagdar inn á politiska kjakið á heimasíðuni hjá Bill Justinussen.*